Norski fiskimálaráðharrin:

# Ólóglig veiða kann oyða fiskastovnar



*– Sýta vit hesum skipum útgerð, og fiskurin ikki sleppur á marknaðin, minkar veiðihugurin. Tað eru Bjørn Kalsø og Helga Pedersen samd um*

**– Ólóglig veiða er ein globalur trupulleiki, har neyðugt er at samstarva millum lond og á altjóða stigi fyri at steðga hesum, sigur norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen**

ÓLÓGLIG VEIÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á tíðindafundi í Listaskálanum mikudagin varpaði norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, ljós á ólógligu fiskiveiðina í Barentshavinum og Irmingarhavinum. Hon segði, at ólóglig veiða er ein trupulleiki, sum fiskiveiðitjóðirnar mugu standa saman um at loysa.

### Samstarv neyðugt

– Hetta er ein globalur trupulleiki, og tí er neyðugt við samstarvi millum lond og á altjóða stigi fyri at koma hesum til lívs. Neyðugt er við áhaldandi sínámillum upplýsing, har fokus verður sett á henda trupulleika.

Helga helt, at fiskiveiðitjóðirnar mugu ganga á odda fyri at steðga hesum.

– Ólógliga veiðan í Barentshavinum kann elva til, at fiskastovnar fara fyri bakka, og tá fer tað eisini at raka skipini og fiskimenninar, sum fiska av hesum stovnum, fiskavirkisvinnuna og samfeløgini, sum hava hesa vinnu.



*– Vit mugu ikki gevast á hendur í stríðnum ímóti ólógligari fiskiveiði. Krøv um sporføri kunnu upp á longri sikt minka um áhugan hjá veiðitjóvum, heldur norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ikki væl fyri

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, sum eisini var á tíðindafundinum, var samdur við norska fiskimálaráðharranum um trupulleikarnar við ólógligari fiskiveiði.

Hann ásannaði, at bæði í Barentshavinum og Irmingarhavinum eru trupulleikar av hesum slagi.

– Kongafiskastovnurin í Irmingarhavinum er ikki væl fyri í løtuni, og tað ger ikki støðuna betri, at ólóglig veiða eisini fer fram á hesum leiðum.

Bjørn og Helga eru samd um, at fiskiveiðitjóðirnar mugu samstarva um at koma hesi veiði til lívs.

– Ein gongd leið er, at londini, sum varða av og umsita fiskiskapin á hesum leiðum, sýta skipum, sum eingi veiðirættindi hava, at fáa útgerð.

### At halda á

Men er í veruleikanum møguligt at loysa trupulleikan við ólógligari fiskiveiði?

– Vit mugu ikki gevast á hendur í hesum stríði, helt Helga Pedersen fyri.

Og Bjørn Kalsø var fullsamdur við norska fiskimálaráðharranum.

Helga nevndi møguleikan við sporføri, har fiskurin verður "fylgdur" úr sjónum og út á marknaðin.

Hon helt, at krøv um sporføri upp á longri sikt kunnu verða við til at minka um ólógligu veiðina.

– Sleppur fiskurin, sum hesi skip veiða, ikki á marknaðin, verður áhugin at fiska minni, segði norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen.

Trolveiða í djúphøvum:

# Sjálvandi skulu vistfrøðilig atlit takast

**– Tað er óaktuelt at steðga veiði við botntroli á djúpum vatni, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, vísir á, at ein av uppgávunum hjá fiskivinnutjóðunum er at útvega mat til heimin**

VISTFRØÐI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var á tíðindafundi í Listaskálanum mikudagin, at útvarpsmaðurin, Dánjál Højgaad, vísti Bjørn Kalsø, landsstýrismanni og norska fiskimálaráðharranum, Helgu Pedersen, uppskotið til skrivið, sum danski fiskimálaráðharrin, Hans Christian Schmidt, hevði orðað til Greenpeace um bann fyri veiði við botntroli á djúpum vatni.

Greenpeace hevur nevniliga biðið donsku stjórnina taka undir við, at ST skal banna troling við botntroli á djúpum vatni.

Í brævinum framgongur, at danski fiskimálaráðharrin mælir donsku stjórnini til at taka undir við hugskotinum.

### Eitt upplegg

Á tíðindafundinum mikudagin legði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, dent á, at brævið hjá Hans Christian Schmidt er eitt upplegg, og at endaliga brævið væntandi fer at taka fyrivarni fyri føroyskum og grønlendskum áhugamálum.

– Men skuldi tað hent seg, at eitt tílíkt bann verður sett í verk, fer tað í fyrsta lagi at fáa avleiðingar fyri einar 4-5 føroyskar trolarar, sum hava loyvi at veiða kongafisk í Irmingarhavinum.

Bjørn legði dent á, at føroyski fiskiskapurin á djúpum vatni er undir skipaðum viðurskiftum.

– Tað er óaktuelt at steðga veiði við botntroli á djúpum vatni. Hinvegin eiga vit málrættað at vera við til at verja um vistfrøðiskipanina, eisini í djúphøvum.

Hann vísti á, at føroyskir myndugleikar áður hava stongt leiðir, har kunnleiki eitt nú er um týdningarmikil koralløkir.

– Vit fara at afturvísa einum slíkum kravi um at banna veiði við botntroli á djúpum vatni, segði Bjørn.

### Matur til heimin

Norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, var samd við Bjørn Kalsø um, at fyrilit skal takast fyri vistfrøðiskipanini í djúphøvum.

– Hinvegin eiga vit sum fiskivinnutjóð at gera nýtslu av tí tilfeingi, sum er í havinum – eisini í djúphavinum.

Hon vísti á, at neyðugt er í størri mun at varpa ljós á ólógligu veiðina, sum fer fram í Barentshavinum og í Irmingarhavinum.

– Vit eiga at stríðast ímóti hesi veiði, sum kann vera við til at taka grundarlagið undan ávísum fiskastovnum.

Helga Pedersen vísti á, at samstundis sum vit eiga fiska av tí náttúrutilfeingi, sum er í havinum, eiga vit sjálvsagt eisini at taka hædd fyri umhvørvinum.

– Men okkara uppgáva sum fiskivinnutjóðir er eisini at útvega mat til heimin, segði norski fiskimálaráðharrin.




*– Sum fiskivinnutjóðir eiga vit at gera nýtslu av tí tilfeingi, sum er í havinum – eisini í djúphavinum. Tað eru Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, samd um*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*